# Nú verður egg ella ungi hjá Starvsmannafelagnum

**- Samráðingarnar um nýggjan sáttmála, ganga væl og allir partar hava sett sær fyri at sleppa undan semingsmanninum hesuferð. Men nú nærkast eini avgerð, sigur formaðurin í Starvsmannafelagnum**

SÁTTMÁLASAMRÁÐINGAR

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Samráðingarnar ímillum Starvsmannafelagið øðrumegin og almennu og hálvalmennu arbeiðsgevararnar hinumegin um ein nýggjan sáttmála, nærkast nú endanum.

Formaðurin í Starvsmannafelagnum sigur, at samráðingarnar hava gingið væl, men at nú nærkast avgerðin um tað verður egg ella ungi.

- Vit hava havt níggju ella tíggju samráðingarfundir og tann seinasti var í gjár. Men nú eru vit so eisini komin hartil, at vit fara at orða uppskot til eina semju, sigur Gunnleivur Dalsgarð.

Hesar samráðingarnar eru serligar við tað, at Starvsmannafelagið hesuferð samráðist bæði við Fíggjarmálaráðið, Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og SEV ísenn fyri at taka allar hesar tríggjar mótpartarnar í einum.

Gunnleivur Dalsgarð sigur, at hetta ger samráðingarnar serliga avbjóðandi, tí hóast allir tríggjar partar hava somu sjónarmið á nógvum økjum, hava teir eisini hvør sínar serstøður á ávísum økjum og tað er ein avbjóðing at samansjóða øll sjónarmiðini.

- Men samráðingarnar hava verið ógvuliga jaligar og allir partar samráðast við einum sonnum vilja til at røkka á mál, sigur formaðurin í Starvsmannafelagnum.

Hann leggur afturat, at enn hevur ikki verið upp á tal at senda boð eftir semingsmanninum.

- Vit hava verið rættiliga ósamd um nógv viðurskifti, men vit hava sett okkum fyri at vit skulu avgreiða samráðingarnar einsamallir uttan at tað skal vera neyðugt at boðsenda semingsmanninum, sigur Gunnleivur Dalsgarð.

So fer tíðin at vísa um tað fer at eydnast!

**Fara at orða uppskot til semju**

Hann sigur, at partarnir hava nú verið ígjøgnum allar sáttmálarnar.

Í øllum førum eru samráðingarnar komnar so mikið áleiðis, at nú skal uppskot til eina semju orðast.

Gunnleivur Dalsgarð sigur, at beint fyri jól skulu partarnir hittast aftur at viðgera uppskot til semju.

Men við hesum er ikki sagt, at tað endar við semju, tí onki er liðugt, fyrrenn alt er liðugt.

- Tað er alt ov tíðliga at siga nakað um enn, leggur hann afturat.

Men hann sigur, at uppleggið frá Starvsmannafelagnum er, at partarnir gera ein sáttmála, sum er væl longri enn vanligt.

- Okkara upplegg er framvegis, at vit gera ein fýra ára sáttmála við teimum ásetingum, sum vit halda, at ein so drúgvur sáttmáli eigur at hava, sigur Gunnleivur Dalsgarð.

-Tað veldst alt um, hvussu góðar sømdir vit fáa, leggur hann afturat.

Hann vísir tó á, at Starvsmannafelagið fer ikki at skriva undir nýggjan sáttmála, fyrrenn álitisfólkini eru sloppin at siga sína hugsan.

Hann ásannar kortini, at samráðingarnar hava verið ov drúgvar, men tað er tí, at Fíggjarmálaráðið hevur samráðst við onnur feløg inn ímillum.



*Samráðingarnar ímillum Starvsmannafelagið øðrumegin og Fíggjarmálaráðið, Kommunurnar og SEV hinumegin, eru í einum jaligum anda og allir partar hava sett sær fyri at koma til eina semju. Um tað eydnast, fáa vit at vita heilt skjótt, tí nú fara vit at skriva uppskot til semju, sigur Gunnleivur Dalsgarð, formaður í Starvsmannafelagnum*

# Vilja hava meiri í løn

**Føroya Arbeiðarafelag og Havnar Arbeiðsmannfelag fara nú at siga sáttmálarnar við arbeiðsgevararnar upp. Eitt krav verður tímalønin skal hækka. Hini arbeiðarafeløgini hava ikki tikið støðu**

SÁTTMÁLASAMRÁÐINGAR

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Mangan hava samráðingarnar ímillum Arbeiðarafeløgini og arbeiðsgevararnar verið harðar. Nú skulu tey hittast aftur*

Tey tímaløntu í Føroyum skulu hava meiri í løn.

Tað heldur Føroya Arbeiðarafelag.

Sáttmálin ímillum arbeiðarafeløgini og Arbeiðsgevararnar gongur út 30 apríl. Og Ingeborg Vinther sigur, at ætlanin er at siga hann upp, so at samráðingar kunnu takast upp um ein nýggjan sáttmála.

Uppsagnarfreistin er fýra mánaðir, so uppsøgnin verður send arbeiðsgevarunum nú fyri nýggjár.

Og hon váttar, at eitt av høvuðskrøvunum í teimum komandi samráðingunum, verður at tímalønin skal hækka.

- Hesi bæði seinastu árini eru prísirnir farnir nokk so fitt upp og tí er stundin komin til at tímalønin hjá vanligum verkafólki hækkar einaferð afturat fyri at byrgja upp fyri tí, sigur Ingeborg Vinther.

Hon nevnir ikki minst, at oljan er dýrkað rættiliga nógv, men allar príshækkingarnar gera, at tímalønin er afturútsigld.

- Men hvussu stór lønarkrøvini verða, er ómøguligt at siga nakað um enn.

Føroya Arbeiðarafelag og Havnar Arbeiðsmannafelag hava samstarvað nógv hesi seinastu árini. Og eisini Hans Joensen, formaður í Havnar Arbeiðsmannafelag, staðfestir, at sáttmálin verður sagdur upp.

- Tað er ongin ivi um, at tímalønin skal upp, tí hesi seinastu árini eru prísirnir hækkaðir nógv og fylgir tímalønin ikki við, verður hon afturútsigld, sigur hann.

-Vit noyðast at hyggja eftir gongdini í samfelagnum hesi seinastu árini. Hendan gjøgnumgongdin fer so at verða grundarlagið undir krøvunum til arbeiðsgevararnar.

- Men vit fara bara at seta veruleikakend krøv, leggur hann afturat.

Men hann ivast heldur ikki í, at onnur krøv verða eisini, eitt nú í sambandi við viðbøtur.

Hans Joensen sigur, at ætlanin er at Føroya Arbeiðarafelag og Havnar Arbeiðsmannafelag fara til samráðingar við felags krøvum, men hann vónar, at øll arbeiðarafeløgini kunnu samstarva og samráðast við arbeiðsgevarar í felag.

- Tað hevði tænt arbeiðaragjøldini best, staðfestir hann.

Hinvegin hevur Havnar Arbeiðskvinnufelag ikki tikið støðu.

Vígdis Johannesen, forkvinna, sigur kortini, at hon væntar, at felagið fer at siga sáttmálan upp.

- Tað hava vit altíð gjørt, tí tað eru altíð onkrir batar, sum kunnu gerast í sáttmálanum, so tað vænti eg eisini, at vit fara at gera hesuferð.

Og hon sigur, at uttan iva verður lønarhækking eitt krav, tí tað gongur alsamt framá í samfelagnum og tað eigur eisini at síggjast aftur í tímalønini.

**Klaksvíkingar ivasamir**

Hinvegin eru klaksvíngar meiri ivasamir. Hvørki Klaksvíkar arbeiðsmannafelag ella –kvinnufelag, hava gjørt av um tey fara at siga sáttmálan upp, ella ikki.

Men fundur hevur verið í báðum feløgunum og tey báðar nevndirnar hava fingið heimild frá limunum at siga sáttmálararnar upp.

Um hendan heimildin so verður brúkt, er ikki greitt enn.

Dia Reyðberg, formaður í Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag, sigur fyri egnu rokning, at hann vónar, at sáttmálin verður sagdur upp. Og hann vónar eisini, at øll arbeiðarafeløgini kunnu samansjóðað krøvini til arbeiðsgevararnar og samráðast saman.

- Tað verður neyvan, at feløgini fara til arbeiðsgevararnar, hvør við sínum krøvum. Vit plaga at samansjóða samráðingarnar og tað gera vit helst eisini hesuferð, sigur hann.

Hanna Isaksen, forkvinna í Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag, sigur, at enn er støða ikki tikin til um sáttmálin verður sagdur upp, so hon fær onki sagt enn.